# Posta flytur føroysk arbeiðspláss til Danmarkar

JON HESTOY

Stjóri, Føroyaprent



Seinastu dagarnar hevur nógv umrøða verið um málið millum Posta og Prentmiðstøðina. Eitt av teimum virkjum, ið hevur merkt sviðan av hesari kapping er Føroyaprent.

Herfyri hevði Posta lægsta tilboð upp á prent, foliering og útbering av einum tilboðsblaði, og tað var ikki eiti á tilboði – útvið 20% var Posta lægri enn hini tilboðini. Stjórin á Posta hevur í fjølmiðlunum lagt stóran dent á, at Posta gevur ikki tilboð uppá prent, men bara vísir á møguligar veitarar. Hetta er tó ikki tann fulli sannleikin. Hetta er bara eitt dømi, av fleiri.

Í sambandi við tilboðsblaðið læt Posta tvey tilboð. Annað var upp á útbering eftir vanligum leisti, og var tann prísurin rættiliga ”vanligur”. Harumframt læt Posta eitt tilboð upp á samlaða pakkan, tað er prent í Danmark, leggja prentlutin í posar, frakta hann til Føroya og bera hann út til hvørt húski. Hetta samlaða tilboðið var ”næstan ov gott til at vera satt”.

Posta sendir ikki rokning upp á prentið til kundan, tað ger danska prentsmiðjan, men tað er eingin ivi um, at Posta bæði skaffar tilboðið og umsitur framleiðsluna, í samstarvi við danskan prentumsitara.

Hvussu hesir prísir kunnu vera so ómetaliga góðir, ja, tað er spurningurin. Eftir okkara meting, so hevur Posta eitt endamál, og tað er at taka lívið av kappingarneytum á útberingarmarknaðinum. Vit, tær føroysku prentsmiðjurnar, eru bara fylgiskaðin – tey, ið fella við í bardaganum. Hví prísirnir eru so góðir, vita vit ikki. Vit hava ikki atgongd til útrokningarnar hjá Posta, men hetta tykist at vera gjørt eftir tí góða gamla ”Smyril siglir allíkavælarbeiðsháttinum”.

Posta roynir nú at skaffa nakrar kundar, ið fast hvørja viku kunnu gerast botnur í posanum teir bera út. Flutningurin til Føroya fer fram við flutninginum hjá Posta, og tann flutningurin fer fram ”allíkavæl”.

Fyri okkum er tað eingin ivi um, at Posta nýtir sína ráðandi marknaðarstøðu til at royna at taka lívið av einasta kappingarneytanum á útberingarmarknaðinum.

Føroysku prentsmiðjurnar verða hart raktar í hesum bardaga. Á Føroyaprent hava vit merkt fyrsta smeitin, og hava sagt 4 starvsfólkum upp, tað er knapt 15% av starvsfólkunum.

Fyri okkum er eingin ivi: Posta flytur føroysk arbeiðspláss til Danmarkar!

# 10. flokkur í Tórshavnar kommunu

MARIN KATRINA FRÝDAL

býráðslimur í Tórshavnar býráð



**- viðmerking til lesarabrøv í bløðunum 18. nov. 2009 hjá Mariu Hammer Olsen, býraðslimi í Tórshavnar býráð og skúlastýrislimi í Kommunuskúlanum, og til lesarabræv hjá Andreu Heindriksdóttir, skúlastýrisforkvinnu í Kommunuskúlanum**

Maria ger viðmerking til brot úr samrøðu, ið tíðindamaður hjá útvarpinum hevði við meg, har eg m.a. annað nevndi, at um býráðið skuldi hálsa um í avgerðini at savna allar 10. flokkar í ein skúla, so fór hetta at hava stórar avleiðingar fyri kommununa, ætlanina í síni heild og fór at hava avleiðingar fyri aðrar ætlanir innan íløgukarm kommunurnar. Her nevndi eg sum eitt dømi, at avleiðingin kundi fara at ganga út yvir ætlanina at byggja Røktarheimið yviri við Strond. Maria kallar hetta skemt og sigur víðari, at 10. flokkur og Røktarheimið einki hava við hvørt annað at gera, og at eitt mál sum Røktarheimið, ikki skal brúkast at ræða fólk við. Eisini Andrea øtast viðmerking mína, og sigur at tílíkt ikki eigur at koma fyri í einum siðmentaðum samfelagi. Gævi sætt, at veruleikin var so einfaldur, sum tit vilja vera við. Nei, tíverri tit báðar. Kommunan hevur ein samlaðan íløgukarm, sum má haldast. Verða umraðfestingar gjørdar av íløgum, gongur hetta sjálvandi útyvir aðrar íløgur. So einfaldur er fíggjarligi veruleikin í dag, og tí kann samanbering mín í útvarpsprátinum væl nýtast. Tað ber snøgt sagt ikki til at nýta somu skattakrónu tvær ferðir. Og at talan er um heilt stórar peningaupphæddir eyka, um Kommunuskúlin skal gerast um til permanenta hýsing av 10. flokki, er prófvast. Gjølligar støðulýsingar frá uttanhýsis serfrøðingum siga 18 til 22 millionir krónur eyka, bert fyri 10. flokk. Men fyri at sláa eitt sindur av køldum vatni í blóði, nú slík øsing er komin í, skal eg loyva mær at tríva í eitt sindur í forsøguna í hesum máli. Men fyrst vil eg tó sláa fast, at tað snýr seg um at fáa eitt so gott 10. floks tilboð til næmingarnar sum gjørligt, innan teir fíggjarkarmar kommunan er før fyri at seta av innan málsøkið, í tí samanhangi er Eysturskúlin ella Kommunuskúlin einki mál í sjálvum sær.

Í álitinum, “10. flokkur – ein øðrvísi skúli” frá 2007, sum varð gjørdur av einum arbeiðsbólki við 6 limum (1 umboð fyri skúlastjórarnar í allari kommununi, 1 fyri lærararnar í Kommunuskúlanum, 1 fyri lærararnar í Eysturskúlanum, 1 fyri miðnámsskúlarnar, 1 fyri vinnulívið og 1 fyri býráðið). Arbeiðsbólkurin kom við einum meiriluta-tilmæli (5 limir av 6) og einum minnulutatilmæli (umboðið fyri lærarnar í Kommunuskúlanum). Meirilutatilmælið mælti til at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í ein sjálvstøðugan skúladepil við egnari leiðslu og lærarum, sum burturav arbeiða í hesum skúla. Mælt varð eisini til, at 10. floks depilin fyribils verður í serstakari lon í Eysturskúlanum, men við framtíðini í huga eigur at verða miðað eftir at byggja ein nýggjan 10. floks depil í Marknagili. At lærarar, sum eru hugaðir at undirvísa í 10. floks deplinum, skulu hava møguleika at søkja um farloyvi úr skúlanum, har teir eru í føstum starvi. Minnilutatilmælið mælir til tvær skúlaeindir, eina í Kommunuskúlanum og eina í Eysturskúlanum.

Øll skúlastýrini í kommununi tóku undir við meirilutatilmælinum at skipa 10. flokk í sjálvstøðugan skúladepil, sum fyribils skuldi halda til í eini sjálvstøðugari lon í Eysturskúlanum.

Umsitingini hjá kommununi tók í sínum tilmæli til politiska myndugleikan við eini greiðar niðurstøðu: at mett varð at ov fáir næmingar eru til at skipa tvær 10. flokseindir við nøktandi undirvísingartilboði. At endamálið við 10. flokki er, at næmingurin meira enn áður skulu kunna seta saman sína egnu útbúgving. Bert við einum rímiliga stórum næmingagrundarlagi kunnu skúlarnir bjóða nøktandi lærugreina- og breytatilboð. Býráðið hevur tikið avgerð um at skipa nýggju skúlarnar í kommununi úr 1. upp í 9. flokk. Rætt er at lata henda leistin galda fyri allar skúlar í kommununi, og skipa eina sjálvstøðuga 10. floks eind at taka ímóti næmingum úr øllum skúlunum við tí fyri eyga, at 10. flokkur verður byrjanin til eina útbúgving.

Mentamálanevnd býráðsins, og síðani býráðið, tóku hvør í sínum lagi einmælt undir við meirilutatilmælinum.

Býráðið samtykti bygnaðarbroytingarnar, og umsókn varð send Mentamálaráðnum.

Mentamálaráðið góðkendi ætlanirnar viðvíkjandi 10. fl., tó við teirri broyting, at tað ikki er lógarheimild at skipa 10. flokk við sjálvstøðugari leiðslu.

Leiðsluspurningurin er tí loystur soleiðis, at ein í leiðsluni í Eysturskúlanum fer at taka sær av leiðsluni av 10. floks deplinum burturav. Hesin fær myndugleika og ábyrgd at skipa 10. flokk í samsvari við álitið “10. flokkur –ein øðrvísi skúli”. Lærararnir í 10. flokki verða settir í Eysturskúlanum, har teir fara at starvast í 10. flokki burturav.

10. flokkur fer at halda til í e-lonini í Eysturskúlanum. Umstøðurnar í skúlanum eru framúr góðar; lonin er nýumvæld við spildurnýggjum fakstovum og ríkiligum plássi, soleiðis at 10. flokkur hevur sítt egna umhvørvi og er skipaður í eina sjálvstøðuga eind.

Býráðið hevur síðani miðvíst arbeitt víðari við at útbyggja og dagføra skúlarnar í allari kommununi eftir tí leisti, at allir 10. flokkar í kommununi frá skúlaárinum 2010/2011 verða savnaðir í Eysturskúlanum. Eisini hava næmingar í spenningi sæð fram ímóti hesum depli, og um stutta tíð skulu teir fyrstu til at velja seg inna á tær ymsu breytirnar. Tær neyðugu fyrireikingarnar eru longu gjørdar í Eysturskúlanum til komandi 10. floks depilin.

Tá Andrea førir fram, at 10. flokkur kann hýsast í Kommunuskúlanum uttan eyka íløgur, er hetta als ikki beint. Kommunuskúlin er í dag í somikið vánaligum standi, at ein dagføring av skúlanum er mett av ráðgevandi arkitekti til at kosta góðar 90 milliónir kr. Ráðgevingin vísir haraftur-at, at skal skúlin hýsa 10. flokki permanent, skal harumframt gerast ein meiríløga uppá 18 til 22 milliónir kr., og tá er innbúgv og útgerð ikki íroknað.

Býráðið vil hava kommunalu skúlarnar á eitt støði, soleiðis at umstøðurnar hjá næmingunum og starvsfólkunum verða so góðar sum møguligt. Verandi lappaloysnir í Kommunuskúlanum, við fyribils barakkum aftanfyri Sjónleikarhúsið og í garðinum hjá frk. Cohr, skulu ikki enda sum varandi loysnir

Í argumentatiónini fyri tveimum 10. flokks eindum, hevur verið ført fram at alneyðugt er við einum kappingarelementi. Hetta argument havi eg ringt við at skilja og spyrji hvat kappast skal um. Kappingin er ikki millum skúlarnar her í býnum, men ímóti útheiminum, serliga eftirskúlum í Danmark. Hesir skúlar eru her á sjarmuherferð við jøvnum millumbili og hava stór lýsingarátøk í bløðunum, har teir dreggja eftir næmingum, tí nógvir peningar er í teimum ungu. Tað er ógvuliga dýrt hjá foreldrum at lata børnini fara uttanlands á eftirskúlar, og eitt øgiligt trýst er á foreldur, ið ikki hava ráðini. Hetta er við til at fremja ein sosialan skeivleika. At næmingatalið í 10. flokki hetta skúlaárið er størri enn undanfarin, kann hugsast at vera ein avleiðing av fíggjarkreppuni.

Vit sum eru vald í býráðið hava eina stóra ábyrgd fyri at taka skynsamar avgerðir við fíggjarligari ábyrgd; avgerðir, ið á bestan hátt stuðla undir trivnaðin hjá øllum í kommununi.

# Syngið við kvøld í Kollafirði

*Tíðindaskriv*

**Skipað verður fyri syngið við kvøldi nú leygarkvøldið kl. 19.30. Ætlanin er, at hetta skal blíva ein fastur táttur í vetrarskránni hjá Missiónshúsinum**

**Fyri alt Guds fólk**

Tað verða ymiskir sangbólkar og einstaklingar, sum koma at luttaka á hesum sangkvøldum.

Somuleiðis verða tað bólkar og einstaklingar frá øðrum kirkjum og samkomin, sum koma at luttaka.

Vit trúgva, at tað er møguligt, at tað Jesus tosar um í Johs. 13, 34-35. Nýtt boð gevi eg tykkum: Tit skulu elska hvør annan; líkasum eg havi elska tykkum, soleiðis skulu eisini tit elska hvør annan.

Í tí skulu allir kenna, at tit eru lærusveinar mínir, um tit hava kærleika hvør til annan!

Vit bjóða fólki úr bygd og bý at verða vælkomin til hesi syngið við kvøld.

Kvøldið verður skipað so, at tað verður høvi hjá teimum vitjandi at luttaka í felagssanginum, eisini verður høvi at hugna sær við einum the/kaffimunni og einum køkubita.

Nú leygarkvøldið koma Oasubrøðurnir at luttaka við teirra góða, fríska, lætta sangi. Hesin bólkurin er kendur fyri sínar góðu ríku teksir í sanginum.

Pláss verður eisini givið fyri spontanum innsløgum, um tit/tú hava hug at syngja ein sang, tá tit koma til syngið við kvøld eru tit vælkomin til tað.

Stýrið bjóðar øllum vælkomin til syngið við kvøldini, og annars til øll tiltøkini, sum eru í Missiónshúsinum.

**Thomas J. Askham**